Kunnu byggja út fyri 160 milliónir næsta ár

Kommunur, sum hava bygt ov nógv út í ár, verða skerdar tey næstu árini

KOMMUNALAR ÚTBYGGINGINGA
Áki Bertholdsen

Næsta ár tær føroysku kommunurnar byggja út fyri 160 milliónir.

Tað hava Landsstýrið og tey bæði kommunufeløgini avtalað.

Tó skal Føroya Kommunufelag hava stýrisfund um málið, áðrenn tað vil skrivað undir, men hitt kommunufelagið, Kommunusamskipan Førooya, KSF, hevur góðtikið avtaluna.

Avtalan um, hvussu nógv kommunurnar kunnu byggja út fyri, er gjørd fyri forða fyri ótálmaðum útbyggingum hjá tí almenna og landsstýrið og kommunufeløgini eru samd um, at tað er betri at gera eina avtalu um at tálma útbyggingunum, heldur enn at gera tað við lóg.

Samstundis hava tey bæði kommunufeløgini váttað fyri landsstýrinum, at tey vilja virka fyri, at kommunur halda hesa semju.

Tey eru eisini samd við landsstýrið, at verður tað staðfest, at ein kommuna ikki heldur avtaluna, kann útbyggingarkvota hennara verða skerd í komandi árum.

Hinvegin kann ein kommuna, ið brúkar minni enn ásettu kvotuna, fáa avlopið flutt til árið eftir.

Eftir fólkatalinum

Útbyggingarkvotan hjá kommununum verður lutað sundur ímillum tær ymsu kommununurnar eftir fólkatalinum

Men kommununurnar í sama øki kunnu lána kvotu ímillum sín, soleiðis at kommunur, ið ikki brúka alla sína kvotu, fáa flutt avlopið til komandi ár, samstundis sum kommunur, ið hava tørv á størri kvotu, kunnu lána avlopið til at byggja út fyri, men avleiðingin kann vera, at tær afturfyri verða skerdar árið eftir.

Harafturat hava kommunurnar og landsstýrið avtalað, at gera kommunrnar í einum øki ítøkiligar staðbundnar verklagsætlanir, kann útbyggingarkvotan hækkast í mesta lagi 30 mió. kr.

– Fæst ikki semja í økinum, kunnu tær kommunur, ið ikki vilja verða við eini felags semju, haldast uttanfyri, men so fáa hesar kommunur kvotu sum um ongin avtala var.

Hildnar uttanfyri

Tað hevur leingi verið eitt ynski hjá Kommunufelagnum, at tær smærru kommunurnar verða hildnar uttanfyri avtaluna.

Avtalan um útbyggingarkvotuna er tískil ikki galdandi fyri Fugloyar-, Svínoyar-, Mikladals-, Húsa-, Hest-, Nólsoyar-, Mykinesar- og Skúvoyar kommunu.

Annars siga landsstýrið og kommunurnar, at kommunur, ið ikki hava brúkt útbyggingarkvotuna fyri figgjarárið 2001, fáa avlopið flutt til 2003, men yvirhøvur kann óbrúkt kvota í mesta lagi flytast yvir 5 ár.

Annars er semja um, at tær kommunur, ið bróta avtaluna, verða skerdar árini eftir.

Tað verður gjørt við, at kvotan í 2004 verður skerd við meirnýtsluni í 2002, men skerjingin kann eisini verða býtt sundur ímillum tey trý komandi árini.

Telja bara helvtina

Umframt hetta er avtalan, at útbyggingarkvotan skal lagast til fyri ikki at leggja kommununum alt ov stórar forðingar í vegin.

Eitt nú verður bara helvtin av útreiðslurnum til havnaútbyggingar taldar við upp í kvotuna. Ell kann kommunan heldur gera av, at taka tað størstu einstøku útbyggingina og lata helvtina av henni telja við í kvotuni. Talan kann t.d. verða um ein barnagarð.

Keypa kommunur byggilendi, verður tað ikki talt upp í kvotuna, men, men útreiðslurnar til byggibúgvinga skal kortini teljast upp í.

Og at enda hava kommunufeløgini og Landsstýrið avtalað, at ikki kann farast uttan um karmin við at lata tað privata ella aðrar myndugleikar byggja út, og so lata kommununar langtíðarleiga verklagið.

Ei heldur skal tað bera til hjá kommununum at seta á stovn sjálvsognarstovnar, sum tær veghalda fyri.

Heldur ikki er loyvt kommununum at bóka útbyggingar sum rakstrarútreiðslur. Útreiðslur, ið stava frá slíkum virksemi, verða at rokna sum íløguútreiðslur.

Kommunalu íløguætlanir 2003

Bruttoíløgur

Túsund kr. Kommunur		Fólkatal 01.05.2001	Vektaðaríløgur uttan avtalu	Vektaðaríløgur við avtalu
3. Viðareiðis	324	341	1.170	1.389
4. Hvannasunds	448	451	1.547	1.837
5. Klaksvíkar	4.717	4.790	16.433	19.514
6. Kunoyar	135	133	456	542
Norðoyarøki	**5.624**	**5.715**	**19.606**	**23.282**
9. Oyndarfjarðar	166	172	590	701
11. Fuglafjarðar	1.514	1.580	5.420	6.437
12. Leirvíkar	821	835	2.865	3.402
13. Gøtu	965	1012	3.472	4.123
14. Nes	1.139	1.187	4.072	4.836
15. Runavíkar	2.437	2.525	8.662	10.286
16. Sjóvar	1.008	1.030	3.534	4.196
17. Skála	637	676	2.319	2.754
Eysturoyarøki	**8.687**	**9.017**	**30.934**	**36.734**
18. Eiðis	694	713	2.446	2.905
19. Sunda	445	468	1.606	1.907
10. Elduvíkar	105	108	371	440
20. Funnings	95	84	288	342
21. Gjáar	59	58	199	236
22. Haldarsvíkar	259	266	913	1.084
23. Saksunar	31	33	113	134
24. Hvalvíkar	343	358	1.228	1.458
25. Hósvíkar	247	267	916	1.088
Sundalagsøki	**2.278**	**2.355**	**8.079**	**9.594**
49. Tórshavnar	17.543	18.230	62.540	74.266
27. Kvívíkar	575	586	2.010	2.387
28. Vestmanna	1.210	1.254	4.302	5.109
29. Kirkjubøar	208	221	758	900
Streymoyarøki	**19.536**	**20.291**	**69.610**	**82.662**
32. Sandavágs	684	699	2.398	2.848
33. Miðvágs	958	1032	3.540	4.204
34. Sørvágs	889	939	3.221	3.825
35. Biggjar	70	80	274	326
Vágaøki	**2.601**	**2.750**	**9.434**	**11.203**
37. Sands	576	600	2.058	2.444
38. Skopunar	491	494	1.695	2.012
39. Skálavíkar	165	191	655	778
40. Húsavíkar	153	139	477	566
Sandoyarøki	**1.385**	**1.424**	**4.885**	**5.801**
42. Hvalbiar	775	762	2.614	3.104
43. Tvøroyrar	1.818	1.854	6.360	7.553
44. Fámjins	113	112	384	456
45. Hovs	120	121	415	493
46. Porkeris	360	383	1.314	1.560
47. Vágs	1.403	1.427	4.895	5.813
48. Sumbiar	401	428	1.468	1.744
Suðuroyarøki	**4.990**	**5.087**	**17.451**	**20.724**
Tilsamans	**45.101**	**46.639**	**160.000**	**190.000**

Hendan talvan vísir, hvussu nógv høvr kommuna kann byggja út fyri komandi ár

Stórur gospelfestivalur fyri øll

Í døgunum 11. til 13. oktober verður skipað fyri Suðuroyar Gospelfestivali, har øll kunnu luttaka, ung sum eldri úr øllum landinum. Tveir dagar verður sangvenjing og endað verður við stórari gallakonsert. Ætlanin er, at hetta skal vera afturvendandi tiltak

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Í oktober verður skipað fyri Suðuroyar Gospelfestivali. Tað er Jens Knudsen, ið er stigtakari.
(Mynd: D. Olsen)

Í vikuskiftinum áðrenn heystfritíðina, frá 11. til 13. oktober, verður stórur gospelfestivalur í skúlanum í Trongisvági.

Hetta er fyrsta ferðin, at skipað verður fyri Suðuroyar Gospelfestivali, men fyrireikararnir vóna, at undirtøkan verður góð, so hetta ikki verður síðsti festivalurin av sínum slag.

Øll kunnu luttaka, ung og eldri úr øllum landinum. Ongar fortreytir skulu lúkast, bert skal sanggleði verða til staðar. Um ein hevur sungið fyrr, ella dugir nótar ella ikki, hevur ongan týdning.

11 sangir eru á skránni. Skipað verður so fyri, at í tveir dagar verða sangir vandir og endabrestur er so við framførslu. Hetta verður stór gallakonsert, har góðir tónleikarar taka lut.

Solistar koma úr Føroyum og Danmark. Orkestrið verður úr Danmark, har tað eru tónleikarar, ið lesa á Det Fynske Musikkonservatorinum, og fólk, ið hava lokið útbúgving har í ár.

Festivalurin skal gerast staðið, har fólk úr øllum landinum koma saman at syngja gospel, siga fyrireikararnir.

Tað er Jens Knudsen, ið er stigtakari. Hann starvast sum tónleikalærari í Suðuroynni, leiður Tvøroyrar Hornorkestur, og hevur eisini sett á stovn Suðuroyar Gospel Choir.

Kórið hevur verið til í eitt ár og hevði fyri stuttum væleydnaða og stórfingna konsert.

Havnarmaður Jens Knudsen starvaðist sum entreprenørur, áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa tónleik. Í Nyborg setti hann á stovn gospelkór, ið er til enn.

Jens hevur arbeitt við fyrireikingunum til gospelfestivalin í longri tíð og vónar, at minst eini 200 fólk tekna seg at taka lut. Nógv er lagt fyri við tøkni og tónleikarum, og eisini er syrgt fyri, at hugaligt og lætt er at gista og líknandi.

Síðsta freist at boða frá luttøku er tann 4. september. Hetta gerst hjá Jens Knudsen, FO-800 Tvøroyri. Eisini kann ringjast 372026 ella 22 3056. Skrivast kann eisini teldubræv til jknudsen@post.olivant.fo. Suðuroyar Gospelfestivalur hevur eisini heimasíðu.

Men ætlar ein sær at taka lut, so ber til at seta seg í samband við Jens Knudsen og frætta nærri og fáa sendan faldara um tiltakið.

Strandferðslan eitt lítið yvirskot

ROKNISKAPUR
Justinus Leivsson Eidesgaard

Tað kostar at halda við líka. Her verður Ritan málað. Ritan sum siglir til Nólsoyar gav eitt hall upp á 3,1 millión í fjør.

Hevði Strandferðslan verið eitt privat felag, og hevði Strandferðslan sum privat felag havt sama virksemi sum í dag og sama tænastustøðið, so hevði tað farið so dundrandi á heysin.

Strandferðslan almannakunngerð rokniskapin fyri fjør og hann vísir eitt yvirskot upp á 148.000 krónur.

Og hyggja vit eftir inntøkusíðuni og útreiðslusíðuni, so eigur at fara kalt niður eftir rygginum á einum og hvørjum vælbjargaðum kaptalisti.

Inntøkurnar hjá Strandferðsluni í fjør vóru 99.5 milliónir, meðan útreiðslurnar vóru góðar 167.138 milliónir. Játtanin á figgjarlógini bjargar muninum á hesum báðum postum. Landskassin spýtir 67.7 milliónir í tóma kassan hjá Strandferðsluni.

Hyggja vit eftir útgreiningunum av rokniskapinum, so er tað bara leiðin vestur í Vágar, sum gevur yvirskot, allar hinar geva undirskot. Vesturleiðin gav eitt avlop upp á 1,1 millión. Strandferðslan eigur eitt annað gullegg. Tað er serflutningur, sum gav eitt yvirskot upp á eina knappa hálva millión.

Strandferðslan rindaði 62,2 milliónir í lønum í fjør. Her av fer Oyggjaleiðirnar, tað eru skipini við helvtini, næst størsti posturin er Farmaleiðir við 12,6 milliónum og fyrisitingin fekk 10,8 milliónir í løn. Til bussarnar vórðu útgoldnar 3,9 milliónir krónur.

Hóast stórt hall, so er politiski viljin í Føroyum, at øll skulu hava møguleika at ferðast frá heimstaðnum og til arbeiðis hvar tað skal vera í landinum. Og meðan vit á hvørjum árið hoyra um hallið hjá Strandferðsluni, so hoyra vit einki um fasta sambandið, sum er millum bygdir og sum eisini er rindað yvir skattin úr landskassanum.

Síðsti møguleiki at sleppa á skúla

SKÚLAGONGD
Ingrid Bjarnastein

Um tú ert ein av teimum, sum hevur søkt inn á skúla og ikki slapp inn, ella um tú varð ov seinur at senda umsókn tína avstað, so er møguleikin fyri hægri lestri framvegis til staðar.

Tað er nú ein skal søkja um tey tómu plássini, sum eru eftir. Um tú ætlar tær til Danmarkar at lesa, so er listin yvir tey tómu plássini at síggja á heimasíðuni: http://www.ivuc.dk Har skalt tú trýsta á »Optagelse« og síðani á »Ledige pladser«. Vanligt er, at ein setur seg í samband við tey einstøku universitetini og fær at vita, hvussu ein skal gera fyri at søkja.

Í Noregi er heimasíðan http://www.samordnaoptak.no/restetorget/ og tann í Svoríki er http://www.studieplatser.nu

Í Onglandi ber til at søkja heilt fram til endan av september og byrjanina av oktober ígjøgnum tað, sum eitur »Clearing«, um tað eru tóm pláss. Heimasíðuna finnur tú á http://www.ucas.co.uk/clearing/

Eisini ber til at spyrja á Altjóða Skrivstovuni á telduposti ask@ask.fo ella á telefon 322065.

Til ber at søkja bæði um tú hevur søkt inn onkrastaðni í ár og eisini um tú ikki hevur søkt.

Í dag hava vit opið frá kl. 11.00-17.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi

Prísirnir eru áðrenn avsláttur

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Citroen Xsara 1,9TD km. 120.000, árg. aug. 1997 121.000,-	Mitsubishi Carisma 1,6GL 5h km. 64.000, árg. mars 1997 95.000,-	Mitsubishi Galant 1,8 GLS km. 186.000, árg. des. 1990 42.000,-
Citroen Xantia 1,8i 16V km. 63.000, árg. okt. 1996 112.000,-	Mitsubishi Carisma 1,6GL km. 81.000, árg. okt. 1996 85.000,-	Ford Sierra 2,0i CLX 4h km. 110.000, árg. nov. 1991 45.000,-
Citroen Xantia 1,9TD stc SX km. 45.000, árg. mars 1999 160.000,-	Mitsubishi Lancer 1,5 GLXi 5H km. 145.000, árg. mai 1992 48.000,-	Hyundai Accent 1,3 LS 5H km. 65.000, árg. feb. 1999 75.000,-
Mitsubishi Galant 1,8 GLSi km. 150.000, árg. mai 1992 37.000,-	Mitsubishi Lancer 1,3 4h km. 28.000, árg. aug. 1998 112.000,-	Jeep Cherokee 2,5 TD km. 80.000, árg. juli 1997 135.000,-
Mitsubishi L300 2,5D km. 161.000, árg. juni 1994 70.000,-	Mitsubishi Galant 1,8 GLSi Sport km. 150.000, árg. juni 1992 37.000,-	Mazda Demio 1,3 5h km. 50.000, árg. feb. 1999 87.000,-

Vit hava fleiri aðrar bilar á goymslu

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Sosialurin - 311503